ISBN 99918-60-05-3

# Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini

Dennis Holm og Bogi Mortensen

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 11/2006**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. Kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

## Innihaldsyvirlit

Inngangur ... 3
Datagrundarlag og háttur ... 5
Kanningin millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum ... 5
Kanning millum ung í 2003 ... 6
Broytingar í vinnumynstrinum seinastu ártíggjuni ... 7
Fleiri fólk arbeiða innan Almennar tænastur o.a. ... 8
Stór minking í talinum av arbeiðsfólki innan Framleiðsluvinnurnar ... 9
Arbeiðsfólki á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í 2006 ... 11
Aldurs- og kynsbýtið ... 11
Arbeiði og útbúgving ... 13
Arbeiðsstyrkin hevur drúgvar royndir ... 14
Trivnaðurin er góður ... 15
Nógv ynskja annað arbeiði ... 16
Nógv vænta tey eru í aðrari vinnu um 5 ár ... 18
Tey royndu vilja halda áfram í vinnuni ... 19
Seinasta ættarliðið av føroyingum á flaka- og fiskavirkjunum? ... 20
Hvat halda tey ungu? ... 21
Tey ungu frávelja flaka- og fiskivinnuna ... 22
Ung vilja hava útbúgving og spennandi arbeiði ... 25
Ein trupulleiki í eygsjón ... 28
Hví ynskja nógv at frávelja fiskivinnuna á landi? ... 29
Moderniseringin av samfelagnum ein trupulleiki fyri fiskivinnuna á landi ... 29
Hvat er í væntu? ... 30
Royndir úr grannalondum okkara ... 31
Mugu arbeiða við loysnum ... 37
Bókmentir og keldur ... 38
Ískoyti 1 ... 39

# Inngangur

Seinastu ártíggjuni eru stórar broytingar farnar fram í føroyska samfelagnum sum heild, eisini á vinnuliga økinum. Hesar broytingar hava eisini merkt fiskivinnuna á landi, sum hevur mist leiklutin sum tann týdningarmesta vinnan á landi. Moderniseringin og menningin av samfelagnum sum heild hevur ført við sær, at vinnumynstrið í landinum er broytt. Meðan tað fyrr vóru framleiðsluvinnurnar – serliga fiskivinnan á landi – sum vóru tær berandi, eru tað í dag almennar- (og privatar) tænastur og almenn umsiting, sum hava størstu framgongd og tær vinnur, sum krevja flest fólk.

Hetta – og (ikki minst) tøknilig menning – hevur eisini ført við sær, at talið av fólki, sum arbeiða innan fiska- og flakavinnuna á landi hevur verið fyri munandi minking. Bara seinastu 15 árini er talið av arbeiðsfólki innan vinnubólkin fiskavøruídnaður minkað við fleiri enn 25% (Hagstova Føroya).

Minkandi tal av arbeiðsfólki innan framleiðsluvinnurnar er eisini ein gongd, sum hevur merkt Vesturheimin sum heild tey seinastu ártíggjuni. Gongdin hevur rættiliga tikið dik á seg seinastu árini, nú tað er vorðið alsamt meiri vanligt at flyta framleiðslur til lond, har kostnaðarstøðið er væl lægri enn í Vesturheiminum.

Avbjóðingin fyri "tær gomlu" framleiðsluvinnurnar og fyri (lokal)samfelagið, sum hevur havt hesar vinnur sum kjarnuvinnur, er at tillaga seg til broyttu støðuna, til tær nýggju avbjóðingarnar, sum broytingarnar hava ført við sær.

Í grannalondum okkara – Noregi og Íslandi – hava vit seinastu 10-15 árini sæð, at tað í vaksandi mun eru útlendingar, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum. Millum høvuðsorsøkirnar til hetta er, at norðmenn og íslendingar frávelja arbeiðið innan hesa vinnu – ella rættari sagt, velja aðrar vinnur framum, og tí hevur verið neyðugt at flyta inn arbeiðsmegi fyri at nøkta tørvin á arbeiðsmegi á flaka- og fiskivirkjunum.

Ein kanning, sum Granskingardepilin fyri Økismenning í 2003 gjørdi millum ung – øll sum gingu í 9. flokki og í 3. flokki á miðnámsskúlunum í 2003 – vísir, at ungir føroyingar ikki ynskja at arbeiða á flaka- og fiskavirkjum. Hetta í sær sjálvum ber boð

um broytingar fyri framman og tørv á tillagingum. Eisini setir hetta spurnartekin við, í hvønn mun man í Føroyum kemur at kunna nøkta tørvin á arbeiðsmegi innan hesa vinnu – og ikki minst, um man ynskir at føroysk arbeiðsmegi skal loysa hesar uppgávur?

Hendan verkætlanin setur fokus á evnið "arbeiðsfólk í føroysku flaka- og fiskivinnuni í framtíðini" og roynir m.a. at svara nøkrum spurningum í sambandi við, hvørji arbeiðsfólkini á flaka- og fiskavirkjunum eru í dag og hvørji, vit kunnu vænta fara at manna hesi arbeiðspláss í framtíðini.

Fyri føroysku flaka- og fiskivinnuna og fyri politiska myndugleikan vil hendan frágreiðing geva svar uppá fleiri áhugaverdar spurningar. Í so máta kann kanningin eisini brúkast sum partur av kjakinum um ein framtíðar politikk á hesum økinum, bæði hjá vinnuni og hjá tí politiska myndugleikanum.

# Datagrundarlag og háttur

Hendan frágreiðingin er grundað á tvær ymiskar spurnablaðskanningar, sum Granskingardepilin fyri Økismenning hevur gjørt. Onnur spurnablaðskanningin varð gjørd millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum í august og september 2006, meðan hin kanningin varð gjørd millum ung í 9. flokki og 3. flokki á miðnámsskúlunum í 2003.

## *Kanningin millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum*

Spurnablaðskanningin millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum varð gjørd á útvaldum flaka- og fiskavirkjum kring landið síðst í august og fyrst í september mánað í 2006 (sí eisini spurnablaðið í Ískoyti 1). Kanningin fevnir um flaka- og fiskavirkir úr øllum pørtum av landinum og er tí eisini væl umboðað, hvat geografiskum býti viðvíkur. Spurnablaðskanningin varð gjørd á hesum flaka- og fiskavirkjum.

| | |
|---|---|
| Palm Seafood, Vágur | Føroya Fiskavirking, Tórshavn |
| Løðhamar, Vágur | Føroya Fiskavirking, Vestmanna |
| Delta Seafood, Tvøroyri | Føroya Fiskavirking, Runavík |
| TG Seafood, Hvalba | Føroya Fiskavirking, Miðvágur |
| Sandoy Seafood, Sandur | Vaðhorn, Strendur |
| Sandoy Seafood, Skopun | PRG Export, Gøta |
| Føroya Fiskavirking, Vágur | Norðís, Eiði |
| Føroya Fiskavirking, Tvøroyri | Kósavirkið, Klaksvík |

Tilsamans svaraðu 708 arbeiðsfólk á 16 flaka- og fiskavirkjum spurnablaðnum. Tað arbeiða millum 2.000-2.200 fólk innan fiskavøruídnaðin í Føroyum (Hagstova Føroya), so talan er sostatt um eitt svarprosent uppá umleið 33%. Men íroknað talinum á arbeiðsfólki, sum arbeiða innan fiskavøruídnaðin, eru eisini fólk, sum arbeiða á virkjum sum Havsbrún, Kovin, Høvdavirkið í Leirvík, Kollafjørð Pelagic, og á uppboðssølum og landingarmiðstøðum o.s.fr. Men hesi virki eru ikki við í spurnablaðskanningini. Talið av fólkið, sum arbeiða á teimum traditionellu flaka- og fiskavirkjum er tí helst millum 1.500 og 2.000 fólk – og svarprosentið tað hægri.

Endamálið við kanningini er at siga nakað alment um alddurs- og kynssamansetingina hjá arbeiðsfólkum innan flaka- og fiskivinnuna á landi. Hvørjar royndir og útbúgving arbeiðsfólkini hava, hvussu tey trívast og um hvønn hugburð tey hava til flaka- og fiskivinnuna á landi. Til at svara hesum spurningum eru 708 svaraði spurnabløð eitt haldgott grundarlag.

## *Kanning millum ung í 2003*

Umframt spurnablaðskanningina á flaka- og fiskavirkjum, verður spurnablaðskanningin millum ung, sum Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi í 2003, eisini brúkt sum grundarlag undir lýsingini í hesum arbeiðsritinum. Tilsamans vórðu tá 998 spurnabløð send út, og av teimum vórðu heili 899 svaraði, og var svarprosentið sostatt 90%. Olga Biskopstø og Bjarni Mortensen stóðu fyri kanningini og skrivaðu frágreiðingina *Ung, útbúgving og fiskivinna*, sum Granskingardepilin fyri Økismenning gav út sum Arbeiðsrit 9/2004. Frágreiðingin kann finnast á heimasíðuni hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning, www. region.fo undir útgávur.

Umframt spurnarblaðskanningarnar eru eisini brúkt arbeiðstakara- og lønarhagtøl frá Hagstovu Føroya, www.hagstova.fo

## Broytingar í vinnumynstrinum seinastu ártíggjuni

Seinastu ártíggjuni er vinnumynstrið í Føroyum broytt, hetta serliga um hugt verður at, hvar fólk arbeiða – innan hvørjar vinnur virksemi er. Tá tað snýr seg um vinnumynstrið, skilja vit ímillum tríggjar vinnubólkar: 1. Framleiðsluvinnur 2. Bygging, Handil, Flutn. o.a. 3. Almenna tænastur o.a. Meiri nágreiniligt eru hesir vinnubólkar settir saman soleiðis:

| **Framleiðsluvinnur** | **Bygging, handil, flutn. o.a.** | **Almennar tænastur o.a** |
|---|---|---|
| Landbúnaður | Bygging | Almenn fyrisiting v.m. |
| Fiskiskapur | Orku- og vatnveiting | Undirvísing |
| Ali- og kryvjivirki | Handil og umvæling | Heilsu- og almannaverk |
| Ráevnisvinna | Gistihús og matstovuvirki | Felagsskapir, mentan o.a |
| Fiskavøruídnaður | Sjóflutningur | Ótilskilað v.m. |
| Skipasmiðjur, smiðjur | Flutningur annars | |
| Annar ídnaður | Postur og fjarskifti | |
| | Fígging og trygging | |
| | Vinnuligar tænastur | |
| | Húshaldstænastur | |

Um hugt verður eftir broytingunum í talinum av lønmóttakarum[i] - hvussu nógv fólk arbeiða innan teir ymisku vinnubólkarnir – í tíðarskeiðinum frá 1990 til 2005, so er tað serliga innan *Framleiðsluvinnurnar* og bólkin *Almenna tænastur o.a.,* at stórar broytingar eru farnar fram, meðan bólkurin *Bygging, handil, flutn. o.a.* lutfalsliga var hin sami í 2005 sum í 1990.

Í 1990 arbeiddu tilsamans 33,4% av lønmóttakarunum innan *Framleiðsluvinnurnar*. Í 2005 var hetta talið 27,0%. Í sama tíðarskeiði er talan um ein vøkstur innan bólkin *Almennar tænastur o.a.* frá 30,6% til 37,1% av samlaða talinum av lønmóttakarunum. Í 1990 arbeiddu umleið 36% av lønmóttakarunum innan *Bygging, handil, flutn. o.a.*. Hetta var eisini støðan í 2005. Sí eisini mynd niðanfyri.







Mynd 1. Talið av lønmóttakarum í 1990 og 2005, býtt í høvuðsbólkar.
*Kelda: Hagstova Føroya*

## *Fleiri fólk arbeiða innan Almennar tænastur o.a.*

Sum víst í mynd 1 omanfyri, so er tað serliga innan høvuðsbólkin *Almennar tænastur o.a.,* at talan hevur verið um ein vøkstur av lønmóttakarum. Í tíðarskeiðinum frá 1990 til 2005 var vøksturin uppá tilsamans 5,6%. Umleið helvtin av vøkstrinum stavar frá vøkstri innan *Almenna fyrisiting* og *Undirvísing*, meðan hin helvtin av vøkstrinum er at finna innan *Heilsu- og almannaverkið*.

| | 1990 | | 2005 | |
|---|---|---|---|---|
| | Tal | %partur av øllum løn-móttakarum | Tal | %partur av øllum løn-móttakarum |
| Almenn fyrisiting og tænastur | 6.878 | 28,9% | 8.481 | 34,6% |
| Felagsskapir, mentan o.a. | 357 | 1,5% | 509 | 2,1% |
| **Almennar tænastur o.a. tils.** | **7.266** | **30,6%** | **9.107** | **37,1%** |

Talva 1. Broytingar í talinum av lønmóttakarum í útvaldum vinnubólkum árini 1990 og 2005.
Kelda: Hagstova Føroya

## *Stór minking í talinum av arbeiðsfólki innan Framleiðsluvinnurnar*

Sum víst í mynd 1 omanfyri, so er talið av lønmóttakarum í framleiðsluvinnunum minkað nógv tey seinastu 15 árini. Samanlagt er talið av fólki, sum arbeiddu innan bólkin *Framleiðsluvinnurnar* minkað úr 7.944 fólkum í 1990 til 6.614 fólk í 2005, ein minking upp á 1.330 fólk. Broytingarnar eru serliga innan fyri bólkin *Fiskavøruídnaður* (tvs. flaka- og fiskivinnan á landi) og bólkin *Fiskiskapur*. Harumframt er talið av lønmóttakarum innan *Ali- og kryvjivinnuna* eisini minkað í nevnda tíðarskeiði. Broytingarnir í nevndu bólkum eru vístir í talvu 2 niðanfyri.

| | 1990 | | 2005 | |
|---|---|---|---|---|
| | Tal | %partur av øllum løn-móttakarum | Tal | %partur av øllum løn-móttakarum |
| Fiskiskapur | 2.910 | 12,2% | 2.463 | 10,0% |
| Ali- og kryvjivirki | 522 | 2,2% | 180 | 0,7% |
| Fiskavøruídnaður | 2.980 | 12,5% | 2.202 | 9,0% |
| **Framleiðsluvinnur tils.** | **7.944** | **33,4%** | **6.614** | **27,0%** |

Talva 2. Broytingar í talinum av lønmóttakarum í útvaldum vinnubólkum árini 1990 og 2005.
Kelda: Hagstova Føroya

Í prosentum er talan um eina minking uppá 26% innan bólkin *Fiskavøruídnaður*. Innan bólkin *Fiskiskap* er minking uppá 15%. Størsta minkingin er innan *Ali- og kryvjivinnuna,* heili 66% í tíðarskeiðinum frá 1990 til 2005. Hendan minking er so stór orsaka av bakkasti innan alivinnuna í 2002 og 2003.

Hóast talið av lønmóttakarum innan fiskivinnuna á landi er minkað munandi seinastu 15 árini, so er tað tó áhugavert, at tann samlaða nøgdin av botnfiskasløgum[1], sum er fiskað undir Føroyum og landað í Føroyum (til føroyskar fiskakeyparar og uppboðssøluna) er lítið broytt. Í 2005 var á leið tann sama nøgdin av botnfiskasløgum landað sum í 1990; bæði árini millum 110.000 - 115.000 tons (Hagstova Føroya). Um gingið verður út frá, at umleið eins stór nøgd varð framleidd á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í 2005 og í 1990, so er hetta uttan iva tekin um, at føroyska flaka- og fiskivinnan á landi er vorðin meiri effektiv seinastu árini. Talið av arbeiðsfólkum er minkað, meðan framleidda nøgdin er hin sama. Ein orsøk er helst, at framleiðslan í størri mun er vorðin automatiserað ella broytt soleiðis, at framleiðslu-flowið er betri. Men hvørji eru tey, sum arbeiða á føroysku flaka- og fiskavirkjunum, og hvør er hugburðurin hjá teimum til eina framtíð innan hesa vinnu? Hesir spurningar v.m. eru viðgjørdir í næsta parti.

[1] Fiskasløg sum m.a. toskur, hýsa, upsi, kongafiskur, longa os.fr. Hetta eru fiskasløg, sum serliga verða arbeidd á føroysku flaka- og fiskavirkjunum.

# Arbeiðsfólki á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í 2006

Í hesum partinum verða viðgjørd úrslitini frá spurnablaðskanningini, sum varð gjørd millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjunum í august og september 2006. Tilsamans svaraðu 708[2] arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjunum á 16 flaka- og fiskavirkjum spurnablaðnum.

## *Aldurs- og kynsbýtið*

Um kanningin verður brúkt sum grundarlag, so kann sigast, at miðalaldurin á teimum, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum í Føroyum, er umleið 39 ár. Tað er at kalla ongin munur á miðalaldrinum á kvinnum og monnum, í báðum førum er miðalaldurin umleið 39 ár.

Um aldurin á teimum, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjum, verður bólkaður eftir 40 ára markinum, so eru umleið helvtin av teimum, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjum, yngri enn 40 ár, meðan hin helvtin er eldri enn 40 ár. Annars er aldursbýtið nøkulunda javnt, um býtt verður í 10 ára aldursbólkar.




Mynd 2. Aldursbýtið í kanningini.

N=683

Áhugavert er, at tað eru lutfalsliga nógv ung, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum. Ein orsøk er helst, at nógv ung velja at vinna sær pening, áðrenn tey fara undir víðari útbúgving. Hetta stuðlar kanningin, sum Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi millum ung í 2003, eisini upp undir, tí nógv vísa í kanningini á, at tey ætla at steðga á eftir fólkaskúlan, m.a. fyri at vinna sær pening, áðrenn tey fara undir víðari útbúgving. Høvuðsorsøkin til, at so nógv gera av at steðga á í fiskivinnuni á landi, er, at fiskivinnan á landi er tann størsti

[2] Legg til merkis, at N = Talið av spurnabløðum, sum er brúkt í smb. við teirri ávísu myndina í arbeiðsritinum. Stendur til dømis í myndini at N=683, so merkir tað, at 683 fólk (spurnabløð) hava svarað júst hesum spurninginum, sum myndin er grundað á.

arbeiðsmarknaðurin fyri ófaklærd og somuleiðis tann arbeiðsmarknaður, har tað er lættast at fáa arbeiði hjá ungum fólkum.

Í kanningini eru umleið 65% kvinnur, meðan 35% eru menn. Kynsbýtið í kanningini víkir tó eitt sindur frá kynsbýtinum, sum lønarhagtølini hjá Hagstovu Føroya fyri vinnubólkin *Fiskavøruídnaður* vísti í juni 2006. Tann uppgerðin vísir, at uml. 57% av arbeiðsfólkunum innan *fiskavøruídnað* vóru kvinnur og 43% vóru menn. Orsøkin til frávikið er millum annað, at tað serliga eru mannfólk, sum arbeiða á teimum virkjunum, sum ikki eru við í kanningini. Hetta er til dømis galdandi fyri uppboðssølur og landingarmiðstøðir. Hartil vísa tey á Havsbrún og Kollafjørð Pelagic eisini á, at har eru tað væl fleiri menn enn kvinnur til arbeiðis[3]. Hesi bæði virkini eru heldur ikki við í kanningini.




Mynd 3. Kynsbýtið í spurnablaðskanningini og hjá teimum sum arbeiddu innan fiskavøruídnað í Juni 2006 (*Kelda: Hagstova Føroya*).

*N=686*

Um hugt verður nærri at, hvussu kynsbýtið er í teimum ymisku aldursbólkunum, so er tað rættiliga ymiskt frá einum aldursbólki til annan. Í tí yngsta aldursbólkinum – tey, sum eru yngri enn 20 ár – eru tað fleiri menn enn kvinnur. Hesin aldursbólkurin fevnir serliga um tey, sum júst eru liðug við fólkaskúlan. Orsøkin til at tað eru fleiri menn enn kvinnur í hesum




Mynd 4. Aldurs- og kynsbýtið í kanningini - bólkað.

*N=670*

[3] Keldur: Havsbrún og Kollafjørð Pelagic, Okt. 2006.

aldursbólkinum er m.a., at ungar kvinnur í størri mun enn ungir menn fara á miðnámsskúla. Hagtøl frá miðnámsskúlunum kring landið vísa eisini, at tað eru lutfalsliga fleiri gentur enn dreingir, ið fara á miðnámsskúla (sí t.d. www.midnam.fo).

At tað eru fleiri kvinnur enn menn í aldursbólkunum 30-39 ár, 40-49 ár og 50-59 ár er helst orsaka av, at tað eru fleiri størv til kvinnur innan fiskivinnuna á landi. Ein onnur orsøk er, at valmøguleikarnir hjá ófaklærdum kvinnum eru færri enn valmøguleikarnir hjá ófaklærdum monnum. Ófaklærdir menn kunnu velja at fara til sjós ella at arbeiða sum ófaklærdir innan t.d. byggivinnuna – og er hetta vinnur, sum peningaliga eru meiri áhugaverdar enn arbeiði á flaka- og fiskavirkjum (Hagstova Føroya).

At tað eru fleiri menn enn kvinnur, sum eru 60 ár og eldri, kann verða orsaka av, at nógvir sjómenn / fiskimenn, sum leggjast upp á land, fara at arbeiða á flaka- og fiskavirkjum tey seinastu árini av arbeiðslívinum.

## *Arbeiði og útbúgving*

Ein heilt stórur partur av arbeiðinum á føroysku flaka- og fiskavirkjunum er ófaklært arbeiði, tvs. at tað ikki krevst nøkur ávís útbúgving fyri at kunna arbeiða. Flaka- og fiskavirkini eru nógv tann størsti arbeiðsmarknaðurin (á landi) fyri ófaklærd í Føroyum. Kanningin vísir eisini, at ein heilt stórur partur – 86% – arbeiða sum arbeiðskvinnur ella –menn, tvs. sum ófaklærd. 6% arbeiða sum leiðari ella millumleiðari, meðan 8% vísa á, at tey hava annað arbeiði t.d. sum trukksjaførur.




Mynd 5. Hvat arbeiðir tú sum?

*N=695*

Um hugt verður at hvørja útbúgving fólk, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjum, hava, so hava tey allarflestu gingið í fólkaskúla, tvs. hava antin eina 7 ára ella 9/10 ára skúlagongd. Í kanningini svara 89%, at tey hava 7 ára skúlagongd, meðan 58% siga seg

hava 9/10 ára skúlagongd. Prosentið er roknað út frá øllum, sum hava svarað spurnablaðnum, men fyrivarni eigur at takast, tí ein partur av teimum, sum hava svarað spurnablaðnum, hava valt *ikki* at svara hvørja útbúgving tey hava. Av somu orsøk eru tað helst fleiri, sum hava bæði 7 ára og 9/10 ára skúlagongd, enn víst í myndini.




Mynd 6. Hvørja útbúgving hava arbeiðsfólkini á flaka- og fiskavirkjum?

Umframt fólkaskúla og miðnámsskúla, so eru tað eisini nøkur, sum hava handverks útbúgving ella millum-langa og langa hægri útbúgving. Talan er t.d. um maskinmenn á flaka- og fiskavirkjunum, umframt at leiðarar og millum-leiðarar í fleiri førum hava einhvørja hægri útbúgving. Tað eru tó eisini fólk við bæði handverks útbúgving og millum-langari og langari hægri útbúgving, sum arbeiða sum arbeiðskvinnur / -menn á flaka- og fiskavirkjum.

## *Arbeiðsstyrkin hevur drúgvar royndir*

Ein munandi partur av teimum, sum arbeiða á føroysku flaka- og fiskavirkjunum, hava drúgvar royndir. Miðal starvsaldurin er umleið 10½ ár. Og um hugt verður nærri at, hvussu longi arbeiðsfólkini hava arbeitt á flaka- og fiskavirkjunum, so gerst greitt, at hóast ein partur av arbeiðsfólkunum eru nýggj í vinnuni, so hava tey flestu arbeiðsfólkini drúgvar royndir. Fleiri enn 80% hava arbeitt á flaka- ella fiskavirki í fleiri enn 2 ár. Meðan 60% av arbeiðsfólkunum hava arbeitt innan vinnuna í 6 ár ella longri. Smá 40% hava arbeitt á flaka- ella fiskavirki í fleiri enn 10 ár.

Umframt, at arbeiðsstyrkin hevur royndir, so er ein munandi partur av arbeiðsstyrkini eisini støðugur skilt soleiðis, at tey hava verið á sama flaka- ella fiskavirki í eitt longri áramál. Meiri enn ein fjórðingur av teimum, sum hava svarað spurnablaðnum, hava arbeitt á sama flaka- ella fiskavirki í 10 ár ella longri. Umleið 43% hava arbeitt á sama flaka- / fiskavirki í longri enn 5 ár. Hinvegin so er ein munandi partur av arbeiðsfólkunum eisini rættiliga "nýggjur" – 27% hava verið á sama virki í styttri enn 2 ár. Hesi fevna um tey, sum júst eru liðug í fólkaskúlanum, og er tað eisini hugsandi, at hesi bert steðga á á flaka- ella fiskavirkinum í styttri tíð, áðrenn tey fara undir framhaldandi útbúgving.




Mynd 7. Hvussu leingi hevur tú arbeitt á flaka- og fiskavirki?

*N=691*




Mynd 8. Hvussu leingi hevur tú arbeitt á hesum flaka- / fiskavirki?

*N=649*

## *Trivnaðurin er góður*

Hóast arbeiði á flaka- og fiskavirkjum oftani ikki verður mett høgt millum mannað, so er trivnaðurin á flaka- og fiskavirkjunum í Føroyum sum heild góður. Tey, sum hava arbeitt á flaka- og fiskavirkjum, siga eisini frá góðum vinskapi og samanhaldi




Mynd 9. Hvussu trívist tú í tínum arbeiði?

*N=695*

millum arbeiðsfólki. Hetta staðfestir kanningin eisini. Heili 77% siga seg trívast heilt gott ella gott, meðan tað bert eru heilt fá, sum vísa á, at tey trívast illa ella heilt illa. Góði trivnaðurin er at finna í øllum aldursbólkunum og er eisini galdandi fyri bæði kynini.

Kanningin, sum varð gjørd millum ung í 2003, vísir eisini, at tey sum hava roynt seg í fiskivinnuni, vísa á góðar royndir, meðan tey, sum ikki hava arbeitt innan fiskivinnuna, eru meiri negativ yvir fyri fiskivinnuni sum heild.

## *Nógv ynskja annað arbeiði*

Hóast trivnaðurin millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum er góður, so eru tað tó nógv sum siga, at tey høvdu farið í annað arbeiði / aðra vinnu, um tey fingu tilboð um hetta. 39% siga, at tey høvdu farið í annað arbeiði / aðra vinnu, um tey høvdu fingið hetta tilboð, meðan 24% siga at tey høvdu ikki tikið av hesum tilboði. Tað eru rættiliga nógv sum ikki duga at siga, hvørt tey høvdu farið í aðra vinnu – 35% svarað, at tey ikki vita, um tey høvdu farið í annað arbeiði. Ein orsøk til hetta er møguliga, at ófaklært ikki hava so nógvar valmøguleikar, tá tað snýr seg um ófaklært arbeiði. Av somu orsøk er trupult at ímynda sær, hvørja aðra vinnu tey skuldu fari í. Spurningurin er í so máta kanska ov lítið ítøkiligur til, at tey halda seg kunna taka greiða støðu til hann. Hetta hava summi eisini viðmerkt í spurnablaðnum, har tey vísa á, at tey høvdu tikið av tilboðnum um annað arbeiði, um talan var um eitt ávíst slag av arbeiði.




Mynd 10. Hevði tú farið í annað arbeiði / aðra vinnu, um tú fekk tilboð um hetta?

*N=695*

**600-800 fólk kundi hugsa sær annað arbeiði**
Umroknað í mun til talið av lønmóttakarum innan fiskavøruídnaðin, so vísir kanningin, at 600-800 fólk (39% av 1500-2000 arbeiðsfólkum) á flaka- og fiskavirkjunum kundu hugsa sær at farið í annað arbeiði.

63% av teimum, sum hava svarað spurnablaðnum, hava tó tikið eina greiða støðu til spurningin, um tey høvdu farið í annað arbeiði, um hetta varð boðið teimum. Av hesum søgdu 61%, at tey høvdu farið í aðra vinnu, meðan 39% søgdu, at tey høvdu ikki farið í aðra vinnu, um tey fingu tilboð um hetta.

Tað eru at kalla eins nógvar kvinnur sum menn, ið siga seg ynskja annað arbeiði. Umleið 39% av kvinnunum og smá 38% av monnunum siga, at tey høvdu tikið av tilboði um annað arbeiði, um hetta stóð teimum í boði. Smá 24% av kvinnunum siga, at tey ikki høvdu farið í annað arbeiði, og sama søgdu 25% av monnunum. Smá 35% av monnunum siga seg ikki vita, um teir høvdu farið í annað starv – tað sama er galdandi fyri góð 35% av kvinnunum.




Mynd 11. Tey ungu høvdu tikið av tilboði um arbeiði í aðrari vinnu?
*Sp.: Hevði tú farið í annað arbeiði/aðra vinnu, um tú fekk tilboð um hetta?*
*N=658*

Tað eru serliga tey ungu, sum siga, at tey høvdu tikið av tilboði um at fara í aðra vinnu. Meiri enn helvtin av teimum, sum eru yngri enn 30 ár, siga at tey høvdu tikið av, um tey fingu í boði annað arbeiði. Nógv siga seg ikki vita, meðan tað bert eru fá, sum siga seg *ikki* vilja fara í aðra vinnu.

Eisini ein munandi partur av teimum, sum eru millum 30 og 50 ár, siga, at tey høvdu tikið av tilboði um annað arbeiði. Nógv í hesum aldursbólkunum eru tó í iva, hetta

serliga galdandi fyri aldursbólkin 30-39 ár. Í hesum aldursbólkinum eru tað tó lutfalsliga fá, sum siga, at tey ikki høvdu tikið av tilboði um arbeiði í aðrari vinnu.

Kanningin vísir – ikki óvæntað – at jú eldri fólk eru, jú minni er hugurin til at fara í aðra vinnu. Tað eru uttan iva fleiri orsøkir til hetta. Ein orsøk kann vera, at tey, sum eru farin um 50 ár, møguliga ikki kenna seg føran fyri at skifta tað kenda arbeiðið út við eitt nýtt ókent arbeiðspláss. Onnur hava helst eisini fyri fleiri árum síðani valt arbeiðið á flaka- og fiskavirki sum sítt lívsstarv. Nógv av teimum, sum eru farin um 60 ár, hava arbeitt á flaka- og fiskavirki í nógv ár og ætla tí helst eisini at enda sítt arbeiðslív í hesari vinnuni.

## *Nógv vænta tey eru í aðrari vinnu um 5 ár*

Sum víst í partinum omanfyri, so eru tað nógv, sum siga, at tey høvdu tikið av tilboði um annað arbeiði, um tey fingu hetta tilboð. Kanningin vísir eisini, at tað eru heilt nógv, sum vænta, at tey eru í aðrari vinnu um 5 ár. Ein triðingur siga, at tey ikki vænta at arbeiða á einum flaka- og fiskavirki um 5 ár. Eitt lítið sindur færri – 31% siga, at tey vænta, at tey eru á einum flaka ella fiskavirki um 5 ár. 38% siga seg ikki vita.




Mynd 12. Hvussu trívist tú í tínum arbeiði?
*N=695*

Aftur her eru tað serliga tey ungu, sum ikki vænta, at tey eru í fiskivinnuni á landi um 5 ár. Útivið 80% av teimum, sum eru yngri enn 20 ár, vænta ikki, at tey eru á einum flaka- og fiskavirki um 5 ár. Bert 2% av teimum, sum eru yngri enn 20 ár, síggja seg á einum flaka- og fiskavirki um 5 ár, meðan umleið 18,5% siga seg ikki vita. Orsøkin til greiða svarið hjá teimum ungu er uttan iva, at tey flestu ungu ætla at fáa sær eina útbúgving – fyrst á miðnámsskúla og síðani eina framhaldandi útbúgving. Hetta er ein av greiðu niðurstøðunum í kanningini millum ung í 2003.




Mynd 13. Tey ungu ætla ikki at verða verandi á flaka- og fiskavirkjum?
*Sp.: Væntar tú at arbeiða á einum flaka- ella fiskavirki um 5 ár?*
*N=673*

Ímillum tey, sum eru 20-29 ár, eru tað eisini fá, sum vænta, at tey eru á einum flaka- ella fiskavirki um 5 ár – bert 13%. Útivið helvtin av teimum 20-29 ára gomlu vænta ikki, at tey eru á einum flaka- ella fiskavirki um 5 ár, meðan smá 38% siga seg ikki vita. Hugsandi er, at ein partur av teimum, sum eru í hesum aldursbólkinum, eru steðgaði á eftir miðnámsskúla, og at tey hava ætlanir um framhaldandi útbúgving.

Tað ein stórur partur av teimum eldri ættarliðunum á flaka- og fiskavirkinum, sum siga seg vænta at halda áfram í vinnuni. Hetta siga umleið helvtin av teimum, sum eru millum 40-49 ár, meðan fleiri enn 60% av teimum, sum eru 50-59 ár, vænta, at tey arbeiða á flaka- ella fiskavirki um 5 ár.

Ein munandi partur av teimum, sum eru farin um 60 ár, siga, at tey vænta ikki, at tey eru á flaka- og fiskavirki um 5 ár. Høvuðsorsøkin til hetta er helst, at tey tá eru vorðin pensjónistar og eru givin á arbeiðsmarknaðinum.

## *Tey royndu vilja halda áfram í vinnuni*

Sum víst í mynd 13 omanfyri, so eru tað serliga tey eldru ættarliðini í kanningini, sum ynskja at halda áfram í fiskivinnuni á landi og hartil vænta, at tey eru í vinnuni um 5 ár.

Eitt annað, sum er galdandi fyri tey, sum vilja halda áfram í vinnuni, er, at tað eru tey royndu, sum vilja halda áfram í vinnuni. Kanningin vísir, at jú longri áramál fólk hava arbeitt á flaka- og fiskavirki, jú størri er áhugin í at halda áfram í vinnuni. Hinvegin vísir kanningin eisini, at tey sum hava arbeitt á flaka- og fiskavirki í eitt longri áramál, eisini eru tey, sum eru mest í iva, tá spurt verður, um tey ynskja at halda áfram í vinnuni. Orsøkin til hetta kann t.d. verða, at hesi illa duga at síggja, hvørja aðra vinnu tey skuldu farið í.

## *Seinasta ættarliðið av føroyingum á flaka- og fiskavirkjunum?*

Í grannalondum okkara hevur gongdin í fleiri ár verið tann, at færri og færri fólk arbeiða sum ófaklærd innan ídnaðarframleiðslur. Hesar framleiðslur eru í ávísan mun fluttar til láglønarlond í Eystur-Evropa ella í Asia, meðan umleggingar í summum førum hava ført við sær økta automatisering og við tí eina rationalisering. Í mið-vestur Jútlandi í Danmark er eitt ítøkiligt dømi um, at tann - fyri økið - fyrr so avgerandi klædnaídnaðurin er minkaður niður í onki. Og líkt er til, at verandi ættarlið av seymu-kvinnum er seinasta av sínum slag´ í økinum.[4] Í einum føroyskum høpi er tað tískil spurningurin, um ættarliðið, sum nú er kjarnin á flaka- og fiskavirkjunum, er tað seinasta ættarliðið av føroyingum á flaka- og fiskavirkjunum?

Í spurnablaðskanningini verður spurt: *Ynskir tú, at børn tíni – eins og tú – skulu arbeiða á flaka- og fiskavirki?* Bert heilt fá – 7 % – svaraðu, at tey ynskja at børn teirra skulu arbeiða á flaka- og fiskavirki. 62% søgdu, at tey ynskja ikki, at børn teirra skulu arbeiða á flaka- og fiskavirki, meðan 18% søgdu




Mynd 14. Ynskir tú, at børn tíni skulu arbeiða á flaka- og/ella fiskavirki

*N=438*

[4] Í mið-vestur Jútlandi varð nógv orka brúkt upp á at umskúla tey, sum arbeiddu innan hesa vinnuna. Og tað eydnaðist eisini í heilt stóran mun at finna nýggj arbeiðir til tey 6.000 fólkini, sum mistu arbeiðið orsaka av, at framleiðslur vórðu fluttar í láglønarlond (Seminar við Torben Henriksen, stjóri fyri Vinnuframahúsinum í Herning økinum, í Øravík á vári 2006).

seg ikki vita. 13% søgdu, at børn teirra vóru í aðrari vinnu. Sí eisini mynd 14.

Hetta bendir á, at ein stórur partur av foreldrunum – sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjum – *ikki* ynskja at børn teirra skulu arbeiða á flaka- og fiskavirkjum. Rákið í samfelagnum sum heild eggjar ungum at fara undir eina førleikagevandi útbúgving. Hetta rákið ávirkar sjálvsagt eisini foreldur, sum somuleiðis eru við til at eggja børnunum til at nema sær útbúgving – hetta er eisini galdandi fyri foreldur, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjum.

Samanumtikið kann sigast, at kanningin millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum í Føroyum vísir, at hóast trivnaðurin á virkjunum er góður, so eru tað nógv, sum kundu hugsa sær at farið í annað arbeiði. Kanningin vísir í fyrsta lagi, at ein stórur partur av teimum, sum eru yngri enn 30 ár, høvdu tikið av tilboði um arbeiði í aðrari vinnu. Í øðrum lagi vísir kanningin eisini, at ein stórur partur av teimum, sum eru í hesum aldursbólkinum vænta ikki, at tey arbeiða á flaka- ella fiskavirki um 5 ár. At enda vísir kanningin eisini, at foreldur ynskja *ikki,* at børn teirra – eins og tey – skulu arbeiða á flaka- ella fiskavirki.

### Hvat halda tey ungu?

Tá ein stórur partur av teimum, sum arbeiða á flaka- og fiskavirki ynskja at sleppa burtur úr vinnuni, og tey, sum eru í vinnuni, ikki ynskja, at teirra eftirkomarar skulu fara í hesa vinnuna, so er spurningurin, hvat komandi ættarlið sigur til at fara í arbeiði í flaka- og fiskivinnuni á landi?

# Tey ungu frávelja flaka- og fiskivinnuna[5]

Kanningin, sum Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi millum ung í 2003 gevur greið svar upp á spurningin omanfyri: Tey ungu hava lítlan áhuga í, at flaka- og fiskivinnan á landi skal gerast teirra framtíðar vinna. Sí eisini myndina niðanfyri.




Mynd 15. Hvar vilja tey ungu arbeiða?
*Kelda: Ung, útbúgving og fiskivinnan, Arbeiðsrit 9/2004*

Kanningin frá 2003 vísir, at bert 3,2% av teimum ungu ynskja at arbeiða innan fiskivinnuna á landi. Býtt á kyn er talan um, at einans 5,2% av dreingjunum og 1,7% av

[5] Hesin parturin er grundaður á frágreiðingina "Ung, útbúgving og fiskivinnan", sum Olga Biskupstø og Bjarni Mortensen hava skrivað. Frágreiðingin er grundað á spurnablaðskanning, sum varð gjørd millum øll, sum gingu í 9. flokki og í 3. flokki í miðnámsskúlunum í 2003. Frágreiðingin varð í 2004 givin út sum Arbeiðsrit 9/2004 av Granskingardeplinum fyri Økismenning – og kann eisini takast niður á www. region.fo.

gentunum ynskja, at teirra framtíðarstarv skal verða innan fiskivinnuna á landi – sí eisini mynd 16. niðanfyri.







Mynd 16. Hvar vilja føroyskar gentur og føroyskir dreingir arbeiða?
*Kelda: Ung, útbúgving og fiskivinnan, Arbeiðsrit 9/2004*

Kanningin vísir, at tað er ein greiður munur á, hvørjar vinnur gentur og dreingir helst vilja arbeiða innanfyri. Størstu ynskini hjá gentunum eru at sleppa at arbeiða innan tænastuvinnurnar, bæði privatar og almennar tænastur. Størstu ynskini hjá dreingjunum eru hinvegin innan fiskiskap og handverk / bygging. Kanningin vísir, at tað sum heild eru fá, sum hava hug at arbeiða innan framleiðsluvinnurnar.

Orsøkin til, at fiskivinnan verður frávald er *ikki*, at tey ungu ikki kenna til vinnuna, tí út við helvtin av teimum ungu hava arbeitt innan fiskivinnuna – uml. 43% av gentunum og 62% av dreingjunum. Av teimum, sum hava arbeitt innan fiskivinnuna, hava út við 30% arbeitt á flaka- og fiskavirkjum, uml. 18% hava egnt, rakt um o.l. Somuleiðis hava nógvir dreingir verið til skips ella róð út, sí eisini mynd 17. niðanfyri.




Mynd 17. Hvar í fiskivinnuni hava tey arbeitt?
*Kelda: Ung, útbúgving og fiskivinnan, Arbeiðsrit 9/2004*

Kanningin vísir eisini, at tey ungu hava gjørt sær nakrar royndir innan fiskivinnuna, tí nógv av teimum, sum hava arbeitt í fiskivinnuni, hava arbeitt í vinnuni í eitt longri tíðarskeið. Hetta serliga tá hugsað verður um, at tey flestu, sum ganga í 9. flokki og í 3. flokki á miðnámsskúlanum, hava havt eitt stutt arbeiðslív. Uml. 48% hava arbeitt innan fiskivinnuna í styttri enn 3 mánaðir. Smá 13% hava arbeitt innan vinnuna millum 3 og 6

mánaðir. 13% hava arbeitt innan vinnuna í 6 til 12 mánaðir, og 27% hava arbeitt í fiskivinnuni í meiri enn 1 ár.




Mynd 18. Hvussu hava tey ungu trivist ymsastaðni í fiskivinnuni?
*Kelda: Ung, útbúgving og fiskivinnan, Arbeiðsrit 9/2004*

Eins og víst í Mynd 18. omanfyri, so vísir kanningin eisini, at tey ungu, sum hava arbeitt innan fiskivinnuna, hava trivist nøkulunda ella væl. Hinvegin hava tey, sum hava arbeitt á flaka- og fiskavirkjum, trivist verri enn tey, sum hava arbeitt innan alivinnuna ella tey, sum hava verið til skips ella róð út. Hóast hetta hava tey, sum hava arbeitt innan fiskivinnuna sum heild trivist nøkulunda ella væl, og er trivnaðurin tí helst ikki ein orsøk til, at tey ungu frávelja eitt framtíðararbeiði innan fiskivinnuna.

Á hesum økinum víkir kanningin millum ung frá kanningini millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjunum, sum jú gav eina greiða mynd av góðum ella heilt góðum trivnaði millum arbeiðsfólk í vinnuni.

## *Ung vilja hava útbúgving og spennandi arbeiði*

Høvuðsorsøkin til, at tey ungu frávelja fiskivinnuna á landi, er, at tey flestu ungu ynskja at nema sær eina útbúgving – heili 91% av teimum, sum luttóku í kanningini svaraðu, at

tey ætla at fáa sær eina útbúgving, bert 1% siga seg ikki ætla at fáa sær útbúgving, meðan 8% ikki vita. Hetta merkir so eisini, at nógv tilvitað frávelja møguleikan sum ófaklærdur arbeiðari á t.d. einum flaka- og fiskavirki.

Tá umræður valið av útbúgving, so leggja tey ungu dent á, at útbúgvingin kann geva teimum møguleika fyri at fáa eitt arbeiði við góðari inntøku, fakligum eins og spennandi avbjóðingum. Kanningin vísir sostatt, at tey ungu meta, at við at fáa sær eina útbúgving, so kunnu tey fáa eina røð av persónligum fyrimunum – og teir persónligi fyrimunirnir verða eisini raðfestir hægri enn t.d. tey samfelagsligu atlitini og tað at kunna arbeiða í heimbygdini / -økinum.




Mynd 19. Ynski til framtíðarstarv
*Sp. Hvørji ynski hevur tú til títt framtíðarstarv? Um tú skuldi valt millum viðurskiftini niðanfyri, hvørji hevði tú so raðfest hægst? (Brúka tølini 1-5 til tínar raðfestingar – 1 fyri ynskið, tú setir fremst o.s.v.)*
*Kelda: Ung, útbúgving og fiskivinnan, Arbeiðsrit 9/2004*

Tá hugt verður at, hvørji ynski tey ungu hava til teirra framtíðarstarv, so er tað eisini spurningurin um eina góða inntøku, sum vigar mest, meðan onnur viðurskifti, sum t.d. at arbeiðið er samfelagsgagnligt, hava minni týdning – sí eisini mynd 19 omanfyri.

Samanumtikið vísir kanningin millum ung í 2003, at heilt fá ung kundu hugsa sær at arbeitt á flaka- ella fiskavirki, hetta hóast nógv ung hava ávísar royndir innan fiskivinnuna. Orsøkin til hetta val er, at tey ungu í stóran mun ætla at fara undir eina útbúgving, sum kann geva teimum møguleika at fáa góða løn og at fáa eitt spennandi og krevjandi arbeiði. Hesar raðfestingar føra so eisini við sær, at ung í stóran mun ynskja at frávelja møguleikan sum ófaklærdur arbeiðari.

## Ein trupulleiki í eygsjón

Kanningar, sum Granskingardepilin fyri Økismenning hevur gjørt – bæði kanningini millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum í 2006 og millum ung í 9. flokki og 3. flokki á miðnámsskúlunum í 2003 – geva greiðar ábendingar um, at áhugin fyri at arbeiða innan fiskivinnuni á landi er minkandi.

Kanningin millum tey, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum, vísir, at nógv kundu hugsa sær annað arbeiði, hetta hóast trivnaðurin í vinnuni sum heild er góður. Tey sum ynskja annað arbeiði eru serliga tey, sum eru yngri enn 30 ár, men hetta er somuleiðis galdandi fyri ein part av teimum, sum eru í aldrinum 30-39 ár og 40-49 ár. Um kanningin millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjunum í landinum verður brúkt sum grundarlag fyri eini umrokning (í mun til talið av lønmóttakarum innan fiskavøruídnaðin), so vísir kanningin, at 600-800 fólk (39% av 1500-2000 arbeiðsfólkum) á flaka- og fiskavirkjunum kundu hugsa sær at farið í annað arbeiði.

Kanningin millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjunum vísir eisini, at foreldur (sum arbeiða í fiskivinnuni á landi), ynskja ikki, at børn teirra skulu fara at arbeiða í fiskivinnuni á landi. Við øðrum orðum, verandi ættarlið á flaka- og fiskavirkjunum ynskja ikki, at komandi ættarlið skal fara í somu vinnu sum tey.

Kanningin millum ung í 2003 vísir, at ung ynskja ikki at arbeiða í fiskivinnuni á landi. Bert 3,2% av teimum ungu ynskja, at fiskivinnan á landi skal gerast teirra framtíðar arbeiðspláss. Høvuðsorsøkin er, at tey ungu ynskja at taka eina útbúgving, sum gevur teimum møguleika at vinna meiri pengar og fáa eitt spennandi og fakliga avbjóðandi arbeiði.

Samanumtikið vísa kanningarnar báðar:

- Ein munandi partur av teimum, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum, ynskja annað arbeiði
- Verandi ættarlið á flaka- og fiskavirkjunum ynskja ikki, at komandi ættarlið / børn teirra skulu arbeiða í fiskivinnuni á landi.

- Tey ungu – komandi ættarlið á arbeiðsmarknaðinum – ynskja ikki at arbeiða í fiskivinnuni á landi.

Hesar kanningar geva sostatt heilt greiðar ábendingar um, at tað eru ávísar trupulleikar í eygsjón, tá ræður um at fáa arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkini. Úrslitini frá kanningunum føra eisini við sær nakrar spurningur:

a) hví ynskja nógv av teimum, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjum annað arbeiði?
b) hví frávelja tey ungu fiskivinnuna á landi?

### Hví ynskja nógv at frávelja fiskivinnuna á landi?

Út frá kanningini, sum varð gjørd millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjunum, ber ikki til at gera nakrar niðurstøðu um, hví nógv arbeiðsfólk í vinnuni ynskja annað arbeiði. Kanningin vísir tó, at trivnaðurin sum heild er góður á virkjunum og er tí ivasamt, hvørt hetta er ein orsøk til, at fólk ynskja annað arbeiði.

Um kanningin millum ung verður brúkt sum útgangsstøði, so er tað greitt, at viðurskifti sum góð løn og eitt spennandi og avbjóðandi arbeiðið fylla nógv, tá ung seta ynski til framtíðina. Júst hesi viðurskifti eru ikki tey, sum eyðkenna fiskivinnuna á landi. Arbeiðið á flaka- og fiskavirkjum er oftani óstøðugt við svingandi lønarinntøku. Arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum teljast eisini millum tey lægstløntu á føroyska arbeiðsmarknaðinum (Hagstova Føroya). Arbeiðið á flaka- og fiskavirkjum er harumframt eisini mangan strævið og eintáttað og av somu orsøkum ikki altíð so spennandi og avbjóðandi. Hesi viðurskifti virka ikki við til, at ung dragast at arbeiði í fiskivinnuni á landi.

### Moderniseringin av samfelagnum ein trupulleiki fyri fiskivinnuna á landi

Ein av høvuðstrupulleikin hjá fiskivinnuni á landi og teimum "gomlu" fiskivinnu (lokal)samfeløgnum er, at moderniseringin av samfelagnum í stóran mun skapar ein trupulleika fyri fiskivinnuna á landi. Moderniseringin av samfelagnum hevur m.a. ført við sær framúr góðar møguleikar fyri at ferðast og samskifta við umheimin. Hetta hevur

ført við sær stórar broytingar fyri samfelagið og hevur ikki minst verið við til at ávirka samleikan hjá fólki, sum her býr.

Ungfólk í dag eru meiri enn bara partur av lokalsamfelagnum, har tey vaksa upp. Tey eru eisini í stóran mun heimsborgarar og verða dag og dagliga – umvegis internet, parabol og fjølmiðlar annars – mint á, hvussu heimurin sær út aðrastaðni, hvussu lívstílurin er, hvørji tilboð og møguleikar eru o.s.fr. Dreymarnir og ynskini til framtíðina verða eisini í stóran mun ávirkað av hesum, og verða tey val, sum tey ungu gera, tí ikki bara tikin út frá inntrykkum, sum tey fáa í føroyska samfelagnum.

Tað modernaða føroyska samfelagið leggur upp til, at tann einstaki skal stremba eftir at skapa so gott lív fyri seg sjálvan sum gjørligt. Hendan stremban røkkur fyri nógv langt út um bygdarmarkið og eisini út um landoddarnar. Hetta verður eisini staðfest í kanningini millum ung í 2003. Í kanningini svara nógv – væl fleiri gentur enn dreingir – at tey ynskja at búseta seg uttanlands, tá tey eru liðug við at útbúgva seg. Og kanningin vísir jú, at tey allarflestu ungu ynskja at nema sær eina útbúgving, soleiðis at tey kunnu fáa eitt arbeiði, sum gevur góða løn og sum førir við sær spennandi og avbjóðandi arbeiðsuppgávur. Hetta merkir í nógvum førum frával av arbeiði innan framleiðsluvinnurnar og somuleiðis eitt frával av teimum lokalsamfeløgum, sum eru fiskivinnusamfeløg.

### *Hvat er í væntu?*

Hóast nógv ung í Føroyum ynskja at taka eina førleikagevandi útbúgving, so eru tað ikki øll ung, sum klára at føra hesi ynski út í lívi – sum av ymiskum orsøkum ikki fara undir eina útbúgving ella klára at gjøgnumføra eina útbúgving. Hesi enda í nógvum førum sum ófaklærd arbeiðsmegi.

Nógv ung kring landið hava sum er ikki nógvar valmøguleikar, tá umræður atgongd til ófaklært arbeiði. Fiskivinnan á landi er fyri nógv lættasta loysnin til ófaklært arbeiði. Nógv verða helst eisini noydd at fara á flaka- ella fiskavirkir at arbeiða – um tey yvirhøvur skulu fáa eitt arbeiði – hóast tey kundu ynskt sær annað arbeiði.

Búskaparliga framgongdin seinastu árini hevur tó ført við sær, at tað eru vorðin alsamt fleiri arbeiðstilboð, sum ófaklærd kunnu velja ímillum. Serliga fyri menn eru valmøguleikarnir fleiri, bæði innan fiskiskap og byggivinnuna. Men eisini fyri kvinnur eru fleiri valmøguleikar, bæði innan privatu handils- og tænastu vinnuna og innan almennar tænastur.

Ein framhaldandi búskaparlig framgongd vil eisini virka við til, at fleiri arbeiðstilboð verða til ófaklærd. Somuleiðis vil ein møgulig oljuvinna hava stóra ávirkan á møguleikarnir hjá ófaklærdum at finna sær arbeiði. Sostatt verður tað ein avbjóðing hjá fiskivinnuni á landi at kappast um tey ófaklærdu arbeiðsfólkini, sum hóast alt verða á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Gongdin við minkandi áhuga fyri arbeiði í fiskivinnuni á landi kann føra við sær, at fiskivinnan á landi kann fáa trupulleikar við at fáa arbeiðsfólk, og hetta vil so aftur ávirka møguleikarnir hjá vinnuni at kappast. Stjórin í Faroe Seafood, Meinhard Jacobsen, segði í SVF í september, at tað sum er ikki er nóg nógv arbeiðsmegi tøk, og hetta ávirkar møguleikarnir hjá Faroe Seafood at levera vøru í mun til gjørdar avtalur (Dagur og Vika, 14. Sept. 2006).

Sum gongdin í samfelagnum er í dag og væntandi verður komandi árini, er líkt til at støðan hjá fiskivinnuni á landi ikki fer at gerast betur í komandi tíðum, tá umræður møguleikan at draga til sín arbeiðsfólk. Færri og færri fólk hava áhuga í at arbeiða í fiskivinnuni á landi, og líkt er til, at vinnan fer at fáa trupult við at draga til sín fólk, ikki minst í longri tíðarskeið. Spurningurin er so, hvussu vinnan klárar at tillaga seg til broyttu støðuna og ikki minst, hvørjir møguleikarnir eru fyri tillagingum?

## Royndir úr grannalondum okkara

Trupulleikin við at fáa fólk í fiskivinnuna á landi er ikki nakað serstakt fyri Føroyar. Eisini í grannalondum okkara, í Norra og í Íslandi, hava tað seinastu árini verið trupulleikar við at fáa fólk at arbeiða í fiskivinnuni á landi, umframt at ídnaðarfyritøkur í Danmark eisini hava sama trupulleika. Bæði í Norra, Íslandi og í Danmark hava ymisk

tiltøk verið sett í verk í eini roynd at tillaga seg avbjóðingarnar við manglandi arbeiðsmegi.

**Útlendsk arbeiðsmegi**

Bæði í Norra og Íslandi er útlendsk arbeiðsmegi í stórum tali flutt inn at arbeiða í fiskivinnuni á landi seinastu árini – eins og í nógvum øðrum vinnum, sum gera nýtslu av ófaklærdari arbeiðsmegi. Í Norra hevur tað í stóran mun verið talan um tamilar og russar ("Et dårligt argument for en god sak", Ottar Brox í Klassekampen, 08.03.03), meðan tað í Íslandi serliga eru polakkar og filipinarar (Grapevine Online, 9. Sept. 2006). Talan hevur bæði verið um skipanir, har tann útlendska arbeiðsmegin hevur verið í styttri tíðarskeið í landinum, og um at útlendingar eru fluttir permanent til landið. Innflutningurin av útlendskari arbeiðsmegi hevur í ávísan mun loyst trupulleikan hjá fiskivinnuni viðv. tørvi á arbeiðsmegi, men nógv kjak er um lønar- og bústaðarviðurskiftini hjá útlendsku arbeiðarunum. Bæði í Norra og í Íslandi eru fleiri ymiskar frágreiðingar og eftirmetingar, sum viðgera hesi viðurskifti.

At flyta inn fremmanda arbeiðsmegi er ein loysn, sum er lutfalsliga skjót at seta í verk – um politiski myndugleikin og partarnir á arbeiðsmarknaðinum ynskja tað. Hetta er eisini ein loysn, sum kann avmarkast í tali av fólki, í tíð og hartil á vinnur og á geografiski øki, um ein ynskir tað - hetta er partvíst gjørt í smb. við pólsku arbeiðsmegina hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Tá umræður útlendska arbeiðsmegi, so eru fleiri royndir gjørdar í Føroyum. Í nýggjari tíð er tað í flestu førum talan um eitt avmarkað tal av fólki á einstøkum virkjum (t.d. MH Export í Lopra og Skálavík, og Tórshavnar Skipasmiðja). Men um talan verður um útlendska arbeiðsmegi í størri tali, so stinga tað seg natúrliga fleiri spurningar upp. Bæði spurningurin um integratión av útlendingunum í samfelagið sum heild, og í samband við møguliga ávirkan á tey bygdasamfeløgini, har arbeiðsmegin býr – ikki minst í teimum førum, har talan er um smá bygdasamfeløg. Hetta eru so nakrir av spurningunum, sum politiski myndugleikin má viðgera í samband við møguligan innflutning av útlendskari arbeiðsmegi.

**Framleiðsla umborð**

Ein onnur loysn uppá trupulleikan við at fáa til vega arbeiðsfólk til fiskivinnuna á landi kundi verið at flutt ein part av framleiðsluni umborð á skipini, sum fiska undir Føroyum. Hetta vildi helst ført við sær, at tørvurin á arbeiðsmegi á landi minkar, meðan tørvur tá hevði verið á fleiri fólkum umborð á skipunum.

Sambært § 10 í lógini um vinnuligan fiskiskap er virking av veiði umborð á fiskiførum undir føroyskum flaggi á føroysku landleiðunum bert loyvd eftir góðkenning frá landsstýrismanninum. Landsstýrismaðurin kann geva loyvi at frysta heilan fisk umborð, meðan serligt loyvi krevst t.d. til virking av frystum flaki og saltfiski. (FISKIVINNUPOLITIKKUR - FYRITREYTIR OG STEVNUMIÐ; Frágreiðing til aðalorðaskiftis sambært § 51, stk. 4, í tingskipanini, Løgtingsmál nr. 101-04/2000). Sum er, er fiskiflotin, ið fiskar undir Føroyum, ikki útgjørdur til hetta endamál. Sostatt er hetta helst ikki ein loysn, sum kann setast í verk her og nú, uttan so at onnur skip koma í flotan fyri verandi skip.

Í Norra eru skipanir, sum loyva partvísa framleiðslu umborð, tvs. geva loyvi til, at t.d. upsi verður heysaður og frystur heilur umborð. Ein partur av upsanum verður so framleiddur á virkjum á landi, meðan ein partur verður sendur til láglønarlond – eitt nú Kina – til framleiðslu har.

Føroysk skip hava eisini gjørt fleiri royndir við framleiðslu umborð Hetta hevur m.a. verið galdandi fyri skipini, sum fiska í eitt nú Barentshavinum. Millum annað hevur nýggi Skálaberg lagt seg eftir at gagnnýta so stóran part av fiskinum sum gjørligt – og fyri m.a. hetta hevur Skálaberg herfyri fingið fyrstafloks skoðsmál frá Greenpeace fyri burðardygga og umhvørvisvinarliga veiðu (Vinnuvitan, 12. oktober 2006). Royndirnar frá Skálaberg kunnu eisini verða brúktar í samband við t.d. eina politiska viðgerð av, hvørja ávirkan tað kundi havt á gagnnýtsluna av fiski á føroysku landleiðini, um so var, at framleiðslan í størri mun fór fram umborð á skipunum.

Spurningurin um at flyta ein part ella alla framleiðsluna umborð á fiskiskipini er ikki ein einfaldur spurningur og krevur tí drúgva viðgerð bæði politiskt og hjá vinnuni sjálvari –

ikki minst tí hetta eru viðurskifti, sum vilja føra við sær grundleggjandi broytingar í fiskivinnuni, sum vit kenna hana í dag.

**Flytan av framleiðsluni til láglønarlond**

Ein onnur loysn, sum alsamt fleiri ídnaðarfyritøkur í Vesturheiminum hava valt ella hava verið tvungnar at velja, er at flyta framleiðsluna til láglønarlond. Millum annað er ein partur av fiskaframleiðsluni hjá eitt nú Norra fluttur til Kina og Baltisku londini. Eisini føroyskar fyritøkur hava sett á stovn virki í Baltisku londunum, sum skal framleiða fisk úr m.ø. Føroyum.

Rákið í Vesturheiminum hevur sostatt eisini sett í gongd hugsanir hjá føroyska vinnulívinum. Uttan iva fara vit at hoyra nógv meiri um hetta í Føroyum komandi árini, og er tað helst bara spurningur um tíð, áðrenn vinnan og politiski myndugleikin fara at taka upp hetta kjakið.

**Betri trivnaður**

Tær loysnirnar, sum hava verið umrøddar omanfyri, krevja í ávísum førum stóra broytingar. Hinvegin eru tað fleiri átøk, sum kunnu bøta um trivnaðin í vinnuni – og sum eisini kunnu gjøgnumførast uttan størri hóvasták.

Eins og aðrastaðni hava eisini danskar ídnaðarfyritøkur merkt trupulleikan av at draga til sín og halda upp á arbeiðsfólk. Og har eru tað fleiri dømi um, at fyritøkurnar hava gjørt tillagingar og broytingar, sum betra um trivnaðin á virkinum. Eins og arbeiði á flaka- og fiskavirkjum, so er arbeiði á ídnaðarfyritøkum ofta eintáttað og strævið. Í hesum sambandi hava fleiri fyritøkur gjørt broytingar, soleiðis at arbeiðsfólkini hava skiftandi arbeiðsuppgávur, umframt at arbeiðsumstøðurnar eru broyttar, so at tær eru so ergonomiskar sum gjørligt (t.d. við skiftandi arbeiðsstøðu). Fleiri fyritøkur hava eisini gjørt góðar royndir við at bjóða arbeiðsfólkunum fysioterapi / massasju. Hetta hevur ført við sær munandi betri trivnað, umframt eina stóra minking í talinum av sjúkradøgum hjá arbeiðsfólkunum (http://www.personalesundhed.dk/referencer/resultater_tidligindsats.html). Nevndu

tillagingar og broytingar hava í ávísan mun verið við til at hildið upp á arbeiðsfólk og drigið til sín nýggj fólk.

Ein annar týðandi partur av trivnaðinum, er at arbeiðsfólk kenna seg vird í sínum arbeiði. Júst á hesum økinum hevur fiskivinnan á landi stórar avbjóðingar at dragast við, tí millum manna er arbeiði á flaka- og fiskavirkjum ikki høgt í metum. Meiri upplýsing um vinnuna og ikki minst meiri upplýsing til arbeiðsfólk í vinnuni umframt fleiri tilboð um skeiðvirksemi og útbúgvingar kann virka við til, at arbeiðið fær meiri innihald.

Onnur viðurskifti sum betra um trivnaðin, sum eisini eru innførd á fleiri føroyskum fyritøkum, er t.d. nývaskaði arbeiðsklæðir hvønn dag umframt góð skiftirúm til arbeiðsfólki.

**Umlegging og automatisering**

Síðani flakaframleiðslan byrjaði á flakavirkjum í Føroyum fyrst í 1960´unum eru munandi automatiseringar farnar fram í framleiðsluni. Flakamaskinum og aðrar maskinur við størri framleiðsluorku eru komnar á marknaðin. Harumframt er framleiðslan í størri og størri mun løgd um frá kassum og bakkum til flowframleiðslu. Øll hesi tiltøk hava bøtt munandi um framleiðsluna hvat viðvíkur kapasiteti, úrtøku, kvaliteti o.s.fr.

Eisini hevur automatiseringin ført við sær, at tørvur er á færri og færri arbeiðsfólkum. Tó eru enn grundleggjandi manuellar arbeiðsuppgávur sum t.d. kílaskering og partering, sum enn ikki (eru heilt) avloystar av maskinum.

Meðan ein automatisering framhaldandi er farin fram, er framleiðslan eisini í størri mun vend frá ídnaðarframleiðslu til framleiðslu av lidnari vøru. Hetta merkir, at fleiri og fleiri uppgávur eru í framleiðsluni og krevur hetta eisini størri arbeiðsmegi. Sostatt er framvegis stórur tørvur á arbeiðsmegi innan føroysku flakaframleiðsluna, hóast ein framhaldandi automatisering upp á sikt vil minka um tørvin á arbeiðsmegi. Spurningurin er tó, hvussu nógv talið av arbeiðsfólkum kann skerjast í samband við

framhaldandi automatisering, og um hetta kann verða við til at minka um tørvin á arbeiðsmegi, so at slepst undan trupulleikum í hesum sambandi í framtíðini?

## Mugu arbeiða við loysnum

Hendan frágreiðingin gevur svar uppá fleiri áhugaverdar spurningar viðv. arbeiðsmegini á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini. Men eins og aðrar frágreiðingar av hesum slagi, so setir hendan frágreiðingin eisini fleiri nýggjar spurningar, sum krevja viðgerð – í hesum føri bæði av vinnuni, fakfeløgum og frá politiskari síðu.

Ein týðandi partur av at menna einhvørja vinnu er at arbeiða við teimum avbjóðingum og hóttanum og møguleikum, sum vinnan hevur ella kann fáa. Hetta krevur miðvíst arbeiði og krevur at bæði vinna, fakfeløg og politiski myndugleikin í felag arbeiða við loysnum.

Kanningarnar, sum eru gjørdar millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjunum og millum ung geva heilt greiðar ábendingar um, at fiskivinnan á landi innan stutta tíð fer at fáa trupulleikar við at fáa til vega arbeiðsfólk. Kanningarnar og frágreiðingin styrkja sostatt um tær ábendingar, sum vinnan sjálv er komin við í føroysku fjølmiðlunum.

Nýggja vitanin, sum fyriliggur í frágreiðingini, krevur, at vit meiri miðvíst seta hol á kjakið og arbeiðið við tillagingarmøguleikum hjá fiskivinnuni á landi. Í frágreiðingini eru nakrir tillagingarmøguleikar viðgjørdir – hetta út frá royndum í øðrum londum – men mugu vit eisini í einum føroyskum høpi arbeiða við loysnum á trupulleikunum, sum fiskivinnan á landi (og aðrar vinnur við) kann koma í í næstu framtíð.

## Bókmentir og keldur


| | |
|---|---|
| Biskopstø og Mortensen. 2004 | *Ung, útbúgving og Fiskivinnan – Arbeiðsrit 9/2004.* Granskingardepilin fyri Økismenning. |
| Brox, Ottar. 2003. | *Et dårligt argument for en god sak.* i Klassekampen 08.03.03. |

FISKIVINNUPOLITIKKUR - FYRITREYTIR OG STEVNUMIÐ; Frágreiðing til aðalorðaskiftis sambært § 51, stk. 4, í tingskipanini, Løgtingsmál nr. 101-04/2000

Grapevine Online, 9. Sept. 2006 www.grapevine.is

Hagstova Føroya: www.hagstova.fo

Miðnámsskúlin í Suðuroy: www.midnam.fo

Personalesundhed.dk

http://www.personalesundhed.dk/referencer/resultater_tidligindsats.html

Sjónvarp Føroya, Dagur & Vika 14. Sept. 2006

Vinnuvitan 12. Okt. 2006

# Ískoyti 1.

## Spurnablað í smb. við kanning millum arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum

Fyri at fáa ein ábending um, hvørji arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum í Føroyum, hvussu trivnaðurin er og hvørjar vónir arbeiðsfólk á flaka- og fiskavirkjum hava til arbeiði innan hesa vinnu, ger Granskingardepilin fyri Økismenning eina spurnablaðskanning um hesi viðurskifti. Spurnablaðs-kanningin verður gjørd í flaka- og fiskavirkjum um alt landið.

**Tú er anonym/-ur í kanningini!**
Kanningin er anonym á tann hátt, at tað einstaka spurnablaðið verður ikki sjónligt í sjálvari frágreiðingini. Hartil er í slíkum kanningum galdandi, at heildin er áhugaverd fram um tað einstaka spurnablaðið.

Tá tygum hava svarað spurnablaðnum, verða tey savnaði inn og send til Granskingardepilin fyri Økismenning, skrivstovan í Vági, har spurnabløðini verða lisin inn í telduforrit. Eftir hetta verða spurnabløðini burturbeind – hetta eisini fyri at tryggja anonymitet. Granskarar á Granskingardeplinum fyri Økismenning hava eisini tagnarskyldu í smb. við spurnablaðskanningina.

Tað er sjálvboðið at taka lut í kanningini, men heitt verður á tygum um at vera so beinasom og svara spurnablaðnum. Spurnablaðið er stutt og tað tekur bert fáa minuttir at svara tí.

Eru nøkur ivamál kunnu tygum altíð ringja til Dennis Holm á Granskingardeplinum fyri Økismenning, tlf. 374477 ella tlf. 222928.

# Spurnablað

**1. Aldur:** ___________ ár

**2. Kyn**: □$_1$ Kvinna □$_2$ Maður

**3. Í hvørjum øki arbeiðir tú?**
□$_1$ Suðuroy □$_2$ Sandoy □$_3$ Vágum □$_4$ Streymoy □$_5$ Eysturoy □$_6$ Norðoyggjum

**4. Hvussu nógv fólk arbeiða á virkjum, har tú arbeiðir?**
□$_1$ Færri enn 20 fólk □$_2$ 20-50 fólk □$_3$ Fleiri enn 50 fólk

**5. Starv - hvat arbeiðir tú sum?**
□$_1$ Arbeiðskvinna/-maður □$_2$ Leiðari / Millumleiðari □$_3$ Annað ____________________

**6. Hvørja útbúgving hevur tú (tú kanst seta fleiri krossar)?**
Fólkaskúla; □$_a$ 7 ár ; □$_b$ 9/10 ár
□$_2$ Miðnámsskúla
□$_3$ Handverksliga útbúgving
□$_4$ Millum-langa hægri útbúgving (3 ár)
□$_5$ Langa hægri útbúgving (5 ár)
□$_6$ Annað ___________________________________

**7. Hvussu leingi hevur tú arbeitt á flaka- og/ella fiskavirki?** _________________ ár

**7a. Av hesum havi eg arbeitt á flaka- og/ella fiskavirki í _________________ ár samanhangandi**

**8. Hvussu leingi hevur tú arbeitt á hesum virkinum?** _________________ ár

**9. Hvussu trívist tú í tínum arbeiði?**
□$_1$ Heilt gott □$_2$ Gott □$_3$ Hampiligt □$_4$ Illa □$_5$ Heilt illa □$_6$ Veit ikki

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **10. Hevði tú farið í annað arbeiði/aðra vinnu, um tú fekk tilboð um hetta?** | | | | |
| □1 Ja | □2 Nei | □3 Veit ikki | □4 Annað ____________________ | |
| **11. Væntar tú at arbeiða á einum flaka- ella fiskavirki um 5 ár?** | | | | |
| □1 Ja | □2 Nei | □3 Veit ikki | □4 Annað ____________________ | |
| **12. Ynskir tú, at børn tíni – eins og tú – skulu arbeiða á flaka- og/ella fiskavirki?** | | | | |
| □1 Ja | □2 Nei | □3 Veit ikki | □4 Børn míni eru í aðrari vinnu | □5 Havi ongi børn |

Takk fyri ómakin!

---

[i] Løntakarateljingin er grundað á skráirnar hjá Toll- og Skatsstovu Føroya um samtíðarskatt, føroysk virki og á skráirnar hjá Landsfólkayvirlitinum.Uppgerðin fevnir um borgarar í landinum millum 16 og 74 ár, sum fáa lønargjaldingar um samtíðarskattaskipanina. Bert tey verða tald uppí, sum hava eina lønarinntøku, sum svarar til minst eina dagløn um mánaðan hjá ófaklærdum arbeiðara. Somuleiðis verða tey tald uppí, sum fara úr arbeiði vegna barsilsfarloyvi ella sjúku.
Av tí at útgjaldingar hjá serliga sjófólki kunnu vera óregluligar, telja vit fólk sum løntakarar, hóast tey onga løn fáa í ein ella tveir mánaðar, um tey so aftur fáa løn mánaðan eftir. Hvønn mánaða eru fleiri, sum fáa lønarinntøku frá ymsum arbeiðsgevarum, men fyri at hvør løntakari bert skal telja við eina ferð hvønn mánaða, verða løntakarar flokkaðir í vinnugrein alt eftir hvaðani størsti parturin av inntøkuni kom í galdandi mánaða.
Hesar reglurnar, vit hava hildið okkum til í uppgerðini, eru lagdar soleiðis, at uppgerðin í frægasta mun fylgir reglum frá ILO og tí verður sambærlig við líknandi uppgerðir í øðrum londum. Ársuppgerðin er grundað á mánaðaruppgerðina í novembur.